# KAPPINGARFØRAR FØROYAR



FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

VINNUSJÓNARMIÐ

FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

# VINNUSJÓNARMIÐ

VINNUSJÓNARMIÐ
© Vinnuhúsið 2022
Myndir: iStock
Mynd s. 25: Faroephoto.fo
Kápa og umbrot: Sára Mikkelsen
Prent: Føroya prent

Fyrsta útgáva, fyrsta upplag 2022
ISBN: 978-99972-1-502-4
*https://www.industry.fo*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 826

FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

# VINNUSJÓNARMIÐ

*Javnbjóðis kappingartreytir innan fyri politiskt ásettar karmar uttan beinleiðis politiska stýring av vinnuni*

*oktober 2022*

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# INNIHALDSYVIRLIT


**SAMANDRÁTTUR** **8**
Inngangur **10**
Besti vinnupolitikkurin **13**
Føroyskur vinnupolitikkur í søguligum baksýni **15**

**VINNUPOLITIKKURIN FRÁ 1948 TIL 1990** **15**
Vinnupolitikkurin eftir 1990 **19**
Onnur viðurskifti eftir 1990 **21**
Samanumtikið um vinnupolitikkin eftir seinna heimsbardaga **22**
Vinnupolitikkurin má endurskoðast og dagførast **23**

**FØROYSKI BÚSKAPURIN** **26**
Sereyðkenni við føroyska uttanlandshandlinum **26**
Handilsmynstrið grundleggjandi týdning fyri vinnupolitikkin **28**

**10 VINNUPOLITISK PRINSIPP SUM STAVNHALD** **29**
**01** Varandi gagnnýtslu av tilfeingi **31**
**02** Støðugar karmar **33**
**03** Vælvirkandi marknaðir **35**
**04** Effektiva og kappingarføra skattaskipan **39**
**05** Effektiva skipan kring almenn rættindi **43**
**06** Góðar og viðkomandi útbúgvingar-
og granskingarskipanir **47**
**07** Smidligan arbeiðsmarknað **49**
**08** Effektivt undirstøðukervi **51**
**09** Vælvirkandi almennan geira **53**
**10** Dagførda vitan um samfelagsgongdina **55**

# SAMANDRÁTTUR

Føroyskur vinnupolitikkur kom veruliga á dagsskránna beint eftir seinna heimsbardaga, tá ið Føroyar fingu heimastýri. Føroyskir politikarar løgdu seg beinanvegin eftir at fáa framgongd og vøkstur í føroyska búskapin við at stuðla fiskivinnuni fíggjarliga til at byggja nýggj skip og endurnýggja fiskiflotan.

Hesin politikkurin riggaði til eitt vist, men stuðulin til fiskivinnuna og stýringin av vinnuni vant alt meira upp á seg og fór fullkomiliga av sporinum, við tí úrsliti, at allur tann føroyski samfelagsbúskapurin fór av knóranum tíðliga í 1990-árunum.

At Føroyar fóru á húsagang tíðliga 1990-árunum hevði vanlukkuligar avleiðingar við sær fyri føroyingar og alt tað føroyska samfelagið, men okkurt lærdu vit av hesum.

Vit høvdu lært, at tað í longdini ikki ber til at skapa búskaparligan vøkstur og at menna vælferðarsamfelagið við politiskari stýring av vinnuni. Somu mistøk skuldu ikki gerast umaftur, og tí varð nýggjur vinnupolitikkur settur út í kortið, har vinnan skuldi vera stuðulsfrí við greiðum skottum millum politisku skipanina og privatu vinnuna.

► *Hesi nýggju prinsippini á vinnupolitiska økinum eiga stóran part av æruni av, at føroyska samfelagið hevur ment seg til tað vælferðarsamfelag, vit kenna í dag.*



Tað er tí hugstoytt at síggja, at nýggj ættarlið av politikarum nú vísa fleiri tekin um ætlanir at menna føroyska vælferðarsamfelagið og umskipa virðir og ognir í samfelagnum við at reka sosialpolitikk við at stýra vinnuna og sostatt venda aftur til vinnupolitikkin, sum varð rikin fram til fyrst í 1900-árunum, tá ið føroyska samfelagið kollsigldi av rikna vinnupolitikkinum.

Føroyar eru ein lítil opin búskapur við stórum handilsligum samskifti á altjóða pallinum. Grundarlagið undir føroyska vælferðarsamfelagnum er tí í stóran mun grundað á handilssamskiftið, sum føroysk vinna hevur í altjóða samfelagnum.

Vinnupolitisku prinsippini og tilmælini frá Føroya Arbeiðsgevarafelag til politisku skipanina taka støði í hesum veruleika. Vinnupolitikkurin skal mennast frameftir. Kikarin skal ikki vendast aftureftir. Politiska skipanin skal áseta karmar, har vinnan virkar undir javnbjóðis kappingarfortreytum, uttan beinleiðis politiska stýring. Umskipan og fígging av føroyska vælferðarsamfelagnum eigur at fara fram gjøgnum skattaskipanina.

Bert soleiðis tryggja vit vælferðarsamfelagið Føroyar í komandi tíðum.

# INNGANGUR

Vinnupolitikkur snýr seg um tær treytir og teir karmar, sum politiska skipanin letur vinnuna virka innan fyri.

Tað ber tí illa til at gera eina einfalda allýsing av vinnupolitikki. Vinnupolitikkurin er eitt úrslit av politiskum avgerðum av ymsum slag á ymsum økjum, ið samanlagt mynda vinnuliga umhvørvið hjá vinnuni.

Hóast vinnupolitikkur kann lýsast sum eitt kloddateppi av politiskum avgerðum av ymsum slag, so eru yvirskipaðu málini og stevnumiðini við vinnupolitikkinum púra greið.

Føroya Arbeiðsgevarafelag lýsir yvirskipaðu málini við vinnupolitikki soleiðis:

► *„Politiska skipanin eigur at geva vinnuni best møguligar karmar, við varandi gagnnýtslu av tilfeingi, at skapa vøkstur og virðisøking í føroyska samfelagsbúskapinum, har kapping og kappingarføri eru drívmegin og reyði tráðurin í privata vinnuliga virkseminum."*

Hvussu røkka vit so hesi yvirskipaðu málunum við vinnupolitikkinum? Hvørja strategi skal politiska skipanin leggja fyri at røkka vinnupolitisku málunum?

Endamálið við vinnusjónarmiðunum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at koma við tilmælum hesum viðvíkjandi.

Endamálið við vinnusjónarmiðunum er at vísa politisku skipanini á tilmælir til skattapolitikk, arbeiðsmarknaðarpolitikk, fíggjarpolitikk, orkupolitikk, umhvørvispolitikk, útbúgvingarpolitikk o.s.fr., soleiðis at yvirskipaðu vinnupolitisku málini verða rokkin við størst møguligum smidleika.

Í tilmælunum verða harumframt serlig viðurskifti havd í huga, ið eyðkenna føroyska samfelagsbúskapin. Tilmælini taka tí støði í tí veruleika, vit liva í, men tey eiga samstundis at vera haldfør fleiri ár frameftir, líka mikið, hvussu búskaparligu konjunkturarnir hátta sær.

Byrja verður við at vísa til orðingarnar hjá OECD um besta vinnupolitikkin.[1] Síðan verður føroyski vinnupolitikkurin lýstur líka frá tíðini, Føroyar fingu heimastýri beint eftir seinna veraldarbardaga, og fram til dagin í dag. Hvat er hent hesa tíðina? Hvussu hevur føroyski vinnupolitikkurin ment seg fram til dagin í dag? Og á hvørji prinsipp byggir Føroya Arbeiðsgevarafelag síni tilmæli til vinnupolitikkin komandi tíðina?

1 Best practice vinnupolitikkurin hjá OECD.



## BESTI VINNUPOLITIKKURIN

Gagnligur vinnupolitikkur snýr seg um at skipa umstøðurnar soleiðis, at vinnan framleiðir størst møguligt virði fyri samfelagið.

Sambært OECD er besti vinnupolitikkurin:

1. *At lata kapital og arbeiðsmegi verða brúkt, har tey geva størst møguligt avkast.* ◀

2. *At stuðlað verður undir menning av produktivitetinum hjá einstaka starvsfólkinum og einstøku fyritøkuni, serliga við betri gagnnýtslu av KT, menning av innovatión og betraðar leiðslu- og arbeiðsgongdir.* ◀

Yvirskipað er besti vinnupolitikkurin sostatt at lata marknaðin fáa frið innan fyri karmar við almennum reglum, sum tryggja samfelagið móti ótilætlaðum avleiðingum.



# FØROYSKUR VINNUPOLITIKKUR Í SØGULIGUM BAKSÝNI

Fyri at fáa eina betri fatan av føroyskum vinnupolitikki, og hvussu hann hevur ment seg fram til dagin í dag, verður tíðin fyrst spolað heilt aftur til 1948, tá ið Føroyar fingu heimastýrislógina, beint eftir seinna heimsbardaga.[1]

## Vinnupolitikkurin frá 1948 til 1990

Tíðina eftir seinna heimsbardaga og líka fram til 1990 var politiska skipanin sera virkin í føroysku vinnuni. Politiska skipanin sá tað sum sína uppgávu at stuðla og útbyggja føroyska vinnulívið við almennum stuðli til m.a. rakstur og íløgur í privatu vinnuni.

*Løgtingið gjørdi longu í 1953 greitt, at tað var sinnað at brúka alla orku til at útvega samfelagnum skip, og Løgtingið hevði ta fatan, at íløgur í skip ikki kundu bera seg uttan stuðul úr landskassanum.* ◄

Skipanir vórðu tí gjørdar, sum tryggjaðu teimum, ið ætlaðu at byggja skip, munagóðan almennan stuðul.

Almenni stuðulin og politiska uppíblandingin í vinnuna vóru tó ikki avmarkað til íløgustuðul at byggja skip. Stórar upphæddir vórðu eisini veittar í vanligum rakstrarstuðli til fiskivinnuna, og landskassin setti partapening í næstan øll flakavirkir kring landið.

1 Lýsingin tekur støði í masterritgerðini hjá Kristoffuri Laksá á Fróðskaparsetri Føroya: Føroyskur vinnupolitikkur 1948–2010.

Hesin politikkurin við almennum íløgustuðli, rakstrarstuðli, partapeningi og veðhaldum fyri privatu vinnuna gjørdist alt meira umfatandi og helt fram líka til búskaparligu kreppuna, sum føroyska samfelagið kom í fyrst í 1990-árunum.

► *Politiska vælvildin mótvegis vinnuni varð grundað á, at politikarar sóu tað sum sína ábyrgd at útvega arbeiðspláss um alt landið, og tá ið vinnufyritøkur vóru í trupulleikum, og arbeiðspláss vóru í vanda, var tað ein politisk uppgáva at bjarga teimum.*

Hetta sást m.a. aftur í orðingunum í samgonguskjølunum frá 1970 til 1985, har tað varð ásett, at einki virki, sum hevði arbeiðsskapandi týdning, skuldi steðga orsakað av fíggjarligum trupulleikum, fyrr enn landsstýrið hevði viðgjørt málið.

Politiski hugburðurin at tryggja arbeiðspláss um alt landið var eisini fremst í huganum hjá politikarunum, tá ið farið varð undir alivinnu í Føroyum í 1980-árunum. Ætlanin hjá politikarunum var at leggja alingina í smáar eindir og býta aliloyvini javnt kring alt landið og soleiðis tryggja, at alingin kom so nógvum bygdum og arbeiðsplássum sum møguligt til góðar.

► *Harvið kann sigast, at fyrilitið fyri virksemi og arbeiðsplássum vigaði tyngri enn fyrilit fyri lønsemi og kappingarføri hjá alivinnuni.*

Óttin fyri, at fyritøkur ella skip fóru av knóranum, og at arbeiðspláss harvið fóru fyri skeytið, fekk politikarar at finna stuttskygdar loysnir fyri at forða fyri, at tílíkt hendi.

Frá miðskeiðis í 1960-árunum og fram til kreppuna fyrst í 1990-árunum var føroyskur vinnupolitikkur ein støðugur kreppupolitikkur, har endamálið var at halda vinnuna gangandi við ymiskum tiltøkum til tess at vinna á tí aktuellu kreppuni.



Soleiðis var vinnupolitikkurin, hóast trupulleikarnir í fiskivinnuni vóru meira grundleggjandi, enn at teir kundu loysast við einum fyribils stuðuls- ella hjálparpakka frá landsstýrinum.

Føroyskur vinnupolitikkur hevur hetta tíðarskeiðið næstan bert snúð seg um at skapa fortreytir fyri og at stuðla upp undir menning av føroyskari fiskivinnu og fiskaframleiðslu. At politiska skipanin satsaði so ógvusliga upp á fiskivinnuna, hevði við sær, at aðrar vinnur høvdu ilt við at koma fyri seg, millum annað tí at tær høvdu ikki sama møguleika at útvega fígging.

Politiska skipanin hevur við sínum vinnupolitikki stóra ávirkan á, hvussu vinnulívið mennir og lagar seg til tær umstøður, vinnan fær at virka undir. Vinnupolitikkurin kann stuðla uppundir, men eisini forða fyri, at vinnan lagar seg til broyttar umstøður.

*Føroyski vinnupolitikkurin fram til kreppuna fyrst í 1990-árunum snúði seg um fyrst at útbyggja fiskivinnuna og síðan at halda lív í henni, og hesin vinnupolitikkurin virkaði forðandi fyri aðrar vinnur.* ◄

Eingin kann ivast í, at vinnupolitikkurin, har politiska skipanin fyrst stuðlaði uppundir at útvega skip í stórum tali og síðan at byggja flakavirkir, hevði stóran týdning fyri menningina av føroysku vinnuni og vøksturin í føroyska samfelagsbúskapinum beint eftir seinna heimsbardaga og í 1950-árunum.

Í 1950-árunum var ring kreppa í Føroyum. Fólk fluttu av bygd og av landinum. Politiska avbjóðingin var at fáa Føroyar úr kreppuni og fáa gongd aftur á virksemið í landinum, soleiðis at bygdirnar ikki vórðu avtoftaðar.

Við íløgustuðli eydnaðist tað politisku skipanini at fáa gongd á skipabyggingina hjá teimum privatu, og miðskeiðis í 1960-árunum var føroyski fiskiskipaflotin ein tann fremsti í heiminum.

Ólukkan var, at politiska skipanin ikki megnaði at avmarka stuðulin til fiskivinnuna, sum tískil gjørdist alt meira umfatandi, við tí úrsliti, at alt ov stór framleiðsluorku varð útvegað til fiskivinnuna bæði á sjógvi og landi.

► *Hesin vinnupolitikkurin gjørdist tí beinleiðis skaðiligur fyri føroyska samfelagsbúskapin í 1970- og 1980-árunum, tí tað var næstan ógjørligt at flyta arbeiðspláss úr fiskivinnuni yvir í aðrar vinnur og harvið fáa eitt meiri fjøltáttað vinnulív.*

Harumframt vóru tillagingar í sjálvari fiskivinnuni næstan ógjørligar, tá ið skip og flakavirkir nærum ikki fingu loyvi til at fara á húsagang, tí stuttskygda atlitið hjá politisku skipanini um at varðveita arbeiðspláss vigaði so tungt.

Tá ið tað kom til marknaðaratgongd og heimamarknað, so var politikkurin at útvega so góða marknaðaratgongd sum gjørligt fyri føroyskar vørur, samstundis sum innlendis framleiðsla varð stuðlað og vard fyri kapping uttanífrá. Høgur tollur var tí á øllum innfluttum vørum líka fram til 1993, tá ið MVG-lógin varð sett í gildi í Føroyum. Eisini var føroyski heimamarknaðurin merktur av stórum monopolum á t.d. tryggingar- og samskiftisøkinum.

Í tíðarskeiðinum fram til kreppuna fyrst í 1990-árunum varð sostatt rikin ein einsháttaður vinnupolitikkur, har politiska skipanin hevði týðandi leiklut við at stuðla og halda lív í fiskivinnuni. Politikarar løgdu stóran dent á at varðveita arbeiðspláss, og síðan seint í 1960-árunum varð rikin ein nærum áhaldandi kreppupolitikkur í fiskivinnuni, har politiska skipanin royndi at forða fyri, at skip ella fyritøkur fóru á húsagang, og arbeiðspláss harvið fóru fyri skeytið.



Tað var helst hvøkkurin frá kreppuni í 1950-árunum, sum ávirkaði vinnupolitikkin alt tíðarskeiðið frá 1950-árunum og fram til kreppuna fyrst í 1990-árunum. Politiska skipanin hevði torført við at lata nakað fara av knóranum, tí tað rakti bygdarsamfelagið so meint.

Ein onnur orsøk til, at politiska skipanin stýrdi næstan øllum føroyska samfelagnum gjøgnum vinnupolitikk, var helst eisini, at almanna-, heilsu- og skúlamál ikki vóru yvirtikin, tá ið vit fingu heimastýrislógina í 1948. Tí kom vinnupolitikkur at fylla so nógv í politiska landslagnum, áðrenn hesi tungu vælferðarøkini vóru tikin til Føroya at umsita.

## Vinnupolitikkurin eftir 1990

Síðst í 1980-árunum varð greitt fyri teimum flestu í politisku skipanini, at nú mátti vend koma í vinnupolitikkin.

*Fiskivinnan bar seg ikki, hóast stuðulsupphæddirnar úr landskassanum vóru ovurhonds stórar.* ◄

Landskassin orkaði ikki at bera hesa byrðuna longur, og farið varð undir at minka um stuðulin til vinnuna, men tá var longu ov seint, tí fyrst í 1990-árunum var fíggjarstøðan hjá landskassanum so vánalig, at pengar vóru ikki tøkir at lata vinnuni.

Føroyski samfelagsbúskapurin kom tí út í eina djúpa og álvarsliga kreppu fyrst í 1990-árunum við stórum arbeiðsloysi, bankarnir fóru á húsagang, og fólk fluttu í metstórum tali av landinum undan kreppuni.

► *Fleiri og fleiri vinnulívsfólk fóru nú sjálvi at koma við sjónarmiðum um marknaðarbúskap, fría kapping og avmarkingar í studningi til vinnuna.*

Hetta, saman við kreppuni umframt trýst og treytir uttanífrá tvingaði politisku skipanina at broyta vinnupolitikkin eftir stuttari tíð.

Í 1991 gjørdi landsstýrið fríhandilsavtalu við ES (tá EF), og við hesi avtaluni kravdi ES, at allur rakstrarstuðul til vinnuna skuldi strikast, afturfyri at føroyskar vørur fingu fríari marknaðaratgongd til evropeiska marknaðin.

Danska stjórnin kravdi somuleiðis stuðulin til vinnuna strikaðan, umframt aðrar stórar broytingar í vinnuliga bygnaðinum, um danir skuldu læna landskassanum pening, eftir at føroysku bankarnir fóru á húsagang tíðliga í 1990-árunum.

Tað var sostatt ein djúp búskaparlig kreppa, húsagangir og fólkafráflyting við vanlukkuligum avleiðingum fyri land og fólk, sum tvingaðu ein nýggjan vinnupolitikk á skrá í Føroyum fyrst í 1990-árunum.

Nú var farið í holt við at nýskipa føroysku samfelagsskipanina, soleiðis at feilirnir og mistøkini, sum vóru atvoldin til kreppuna, ikki fóru at endurtaka seg.

► *Nýggi vinnupolitikkurin bygdi á ein orðaðan yvirskipaðan vinnupolitikk, sum var studningsveikur og generellur, har høvuðsuppgávan hjá tí almenna var at skapa góðar karmar fyri vinnuligum virksemi, sum so vinnan skuldi fylla út á marknaðarligum grundarlagi.*



Hetta merkti, at politiska skipanin ikki longur skuldi hava eina ávirkan á, hvørji virkir vóru sett á stovn, hvør skuldi fáa fígging, ella um fyritøkur, sum vóru komnar í trupulleikar, skuldu bjargast.

Eftir kreppuna í 1990-árunum eru bert einstøk dømir um, at politikarar hava bjargað fyritøkum frá at fara á húsagang. Skelkurin eftir kreppuna og óttin fyri at endurtaka feilirnar undan kreppuni hava tí verið viðvirkandi til, at farið varð frá einari skipan við stórum almennum leikluti í vinnuni til eina skipan við lítlum almennum leikluti í vinnuni.

*Almenna uppgávan broyttist frá beinleiðis stýring av vinnuligum virksemi til at seta karmarnar, sum vinnan skuldi virka innan fyri.* ◄

## Onnur viðurskifti eftir 1990

Tað var ikki bert vinnuligi leikluturin hjá tí almenna, sum broyttist eftir kreppuna 1990-árunum. Tað hendu eisini fleiri aðrar nýskipanir og broytingar í føroysku samfelagsskipanini, sum høvdu týðandi ávirkan á vinnuligu umstøðurnar. Arbeiðsloysisskipanin, MVG-lógin umframt yvirtøkurnar av tungu vælferðarøkjunum eru nøkur dømir um hesar nýskipanir.

Fríhandilsavtalan við ES hevði við sær, at Føroyar fingu eina meirvirðisgjaldsskipan, sum varð sett í gildi við MVG-lógini 1. januar 1993. Nú bar ikki longur til at verja heimamarknaðin við høgum verjutolli, tí nú skuldi avgjaldið vera tað sama, líka mikið um vøran var framleidd í Føroyum ella aðrastaðni.

Vinnan tók væl ímóti MVG-skipanini, tí nú kundi vinnan framleiða og handla avgjaldsfrítt. Fyri tænastuvinnurnar umframt nakrar vinnur, ið høvdu verið vardar av verjutolli,

kom meirvirðisgjaldsskipanin tó at merkja, at tær nú skuldu leggja MVG oman á søluna, sum frammanundan hevði verið avgjaldsfrí.

MVG-skipanin hevði tó við sær eina munandi dagføring av føroyska heimamarknaðinum til fyrimuns fyri føroyska brúkaran, tí avgjaldið á vanligar vørur, t.d. klædnavørur, leikur, búnýti og aðrar nýtsluvørur lækkaði munandi, í nøkrum førum úr góðum 40% niður á 25%.

Í 1992 varð føroyska arbeiðsloysisskipanin, ALS, sett á stovn. Arbeiðsloysisskipanin lætti trýstið á politisku skipanina um at tryggja arbeiðspláss kring landið gjøgnum vinnupolitikkin, tí nú var eitt trygdarnet undir teimum, sum gjørdust arbeiðsleys.

Føroyingar yvirtóku eisini umsitingina og ábyrgdina av skúla-, undirvísingar-, heilsu- og almannamálum hetta tíðarskeiðið. Hesar yvirtøkur hava broytt innihaldið í føroyskum politikki munandi, tí raðfestingarnar á tungu vælferðarøkjunum fylla nógv á politisku dagsskránni í dag.

## Samanumtikið um vinnupolitikkin eftir seinna heimsbardaga

Føroyski vinnupolitikkurin eftir seinna heimsbardaga kann sostatt býtast upp í tvey tíðarskeið, tíðina fyri og tíðina eftir 1990.

► *Í tíðini fyri 1990 var fremsta málið hjá politisku skipanini at skapa arbeiðspláss og at halda lív í arbeiðsplássum kring alt landið.*

Hetta varð gjørt við almennum stuðli. Umfatandi fíggjarligur stuðul varð latin úr landskassanum til privatu fiskivinnuna kring alt landið. Almenni stuðulin til fiskivinnuna virkaði samstundis forðandi fyri, at aðrar vinnur fingu fótin fyri seg í Føroyum.

Hesin vinnupolitikkurin fór fullkomiliga av sporinum og endaði við einum búskaparligum skrædli, har allur tann føroyski samfelagsbúskapurin fór av knóranum tíðliga í 1990-árunum.

*Búskaparkreppan tvingaði ein nýggjan vinnupolitikk á skrá í Føroyum fyrst í 1990-árunum, har greiðari linjur vórðu strikaðar upp millum almenna og privata uppgávu- og ábyrgdarbýtið.* ◄

Tað komu eisini fleiri aðrar nýskipanir av føroyska samfelagnum eftir 1990, sum hava havt ávirkan á vinnuliga bygnaðin og politisku atferðina mótvegis vinnuni, t.d. ALS-skipanin, MVG-skipanin og yvirtøkurnar av umsitingini av tungu vælferðarøkjunum.

## Vinnupolitikkurin má endurskoðast og dagførast

Tað var í tómrúminum eftir búskaparkreppuna fyrst í 1990-árunum, at partarnir á privata føroyska arbeiðsmarknaðinum sjálvbodnir tóku seg saman at greina, hvørjir karmar vóru neyðugir fyri at geva føroyskum vinnulívi best møguligar karmar at virka innanfyri.

Úrslitið var vinnupolitiska ritið „Karmar fyri føroyska vinnu“ frá mai 1994. Ritið vísti á gongdar leiðir burtur úr kreppuni, og ritið gjørdist seinni grundarlagið undir fimm vinnupolitiskum ritum, sum Vinnumálaráðið gav út í 1998 og 1999, har vinnupolitikkurin varð orðaður í 5. riti.

Í 2005 samtykti Løgtingið ein orðaðan vinnupolitikk, eftir at Løgtingið hevði havt aðalorðaskifti um at dagføra vinnupolitikkin.

Síðan tá er vinnupolitikkurin ikki dagførdur, og tað er hetta, sipað verður til, tá ið Føroya Arbeiðsgevarafelag javnan hevur víst á, at vinnupolitikkurin frá 2005 eigur at verða endurskoðaður og dagførdur.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur tvær ferðir dagført síni vinnusjónarmið síðan vinnupolitiska ritið frá 1994. Fyrru ferð var í 2002 við ritinum „Vinnusjónarmið – Eitt íkast til kjak um vinnu- og samfelagskarmar", og aðru ferð var í 2011 við ritinum „Vinnusjónarmið – Koyrið so á motorin".

► *Hetta ritið er sostatt triðja dagføringin av vinnusjónarmiðunum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag.*





# FØROYSKI BÚSKAPURIN

Føroyski búskapurin er sera lítil og opin í altjóða samanhangi. Føroyar hava altíð havt stórt búskaparligt og handilsligt samskifti úteftir. Handilssamskifti úteftir við vørum, tænastum, arbeiðsmegi og kapitali er ein neyðug og týdningarmikil fortreyt fyri búskaparligum vøkstri og vælstandi í føroyska samfelagnum.

Umleið ein triðingur av samlaðu tilgongdini av vørum og tænastum í føroyska samfelagsbúskapinum kemur uttanífrá, samstundis sum væl meira enn ein triðingur av samlaðu tilgongdini av vørum og tænastum fer av landinum.

► *Føroyar hava tí stórt handilssamskifti við útheimin bæði á innflutnings- og útflutningssíðuni.*

## Sereyðkenni við føroyska uttanlandshandlinum

Uttanlandshandil snýr seg um at býta um vørur og tænastur millum lond, og í dag býta flestu framkomin lond somu sløg av vørum og tænastum ímillum sín.

► *Fiskur og fiskavørur hava í nógv ár fylt oman fyri 95% av føroyska vøruútflutninginum, og aðrar vørur bert hava talt smá 5% av føroyska útflutninginum.*

Vøruinnflutningurin er meiri fjøltáttaður.



*Størsti parturin av vørum, sum føroyingar og føroysk húsarhald brúka í gerandisdegnum, eru innfluttar vørur.* ◄

Tað er sostatt stórur munur á sølu- og keypssíðuni í føroyska uttanlandshandlinum við vørum.

Nógv tann størsti parturin av føroyska uttanlandshandlinum við vørum er við evropeisk lond, men her eru eisini nakrir eyðsýndir munir í samhandlinum við onnur lond. Tað mesta av vøruútflutninginum fer til Evropa, serliga uttan fyri Norðurlond. Nógv tann størsti parturin av vøruinnflutninginum kemur eisini úr Evropa, harav rættiliga stórur partur av føroyska innflutninginum kemur umvegis Danmark.

Uttanlandshandil snýr seg ikki bert um handil við vørum. Ein týðandi partur av uttanlandshandlinum er handil við tænastum, serliga nú allur heimurin verður alsamt meiri talgildur. Tað er alt ov lítil vitan um henda partin av føroyska uttanlandshandlinum.

Tað skal tí viðmerkjast, at tað gevur ikki rættvísandi mynd av føroyska uttanlandshandlinum, at tað eingin góð og dagførd uppgerð finst av føroyska tænastujavnanum, tí hesin parturin av altjóða handilssamskiftinum er vaksin nógv í kjalarvørrinum av stóra vøkstrinum í ferðavinnuni og talgildu menningini og framgongdini á øllum økjum hesi seinastu árini.

### Handilsmynstrið grundleggjandi týdning fyri vinnupolitikkin

Føroysk vinna er sostatt ein integreraður partur av altjóða samfelagnum, bæði viðvíkjandi tilgongd og frágongd í føroyska búskapinum.

► *Føroyski uttanlandshandilin hevur nøkur sereyðkenni, sum hava týdning fyri váðamyndina í føroyska samfelagsbúskapinum.*

Hesar fortreytir hava stóran týdning, tá ið vinnupolitikkurin verður lagdur til rættis.



## 10 VINNUPOLITISK PRINSIPP SUM STAVNHALD

Við støði í søguligu bakgrundini í rikna vinnupolitikkinum, serligu eyðkennunum við føroyska búskapinum, og í tí, sum verður hildið at vera *best practice* í vinnupolitikki, ber til at orða nøkur vinnupolitisk prinsipp, sum allar avgerðir, ið ávirka vinnupolitisku karmarnar, eiga at verða mett eftir.

Um politiska skipanin hevði megnað at fylgt hesum prinsippum í teimum avgerðum, sum verða tiknar á vinnuliga økinum, hevði tað skapt fortreytir fyri, at vit kunnu fáa sum mest burtur úr teirri vitan, teimum førleikum, tí kapitali og náttúrutilfeingi, ið vit hava í Føroyum.

*Kapping er drívmegin fyri virksemið í vinnuni.* ◄

Føroyskar fyritøkur á útlendsku marknaðunum eru hvønn dag í harðari kapping við útlendskar kappingarneytar. Tað eru føroysku fyritøkurnar eisini á heimamarknaðinum. Her kappast tær ikki bara sínámillum, men eisini beinleiðis ella óbeinleiðis við líknandi fyritøkur uttanlands.

Tað eru fleiri viðurskifti, sum kunnu gera tað tvørligt at dríva vinnu í Føroyum. Føroyar liggja mitt í Atlantshavinum við langari leið til kundar og veitarar.

Harumframt er føroyski heimamarknaðurin lítil í vavi.

Hesi viðurskifti fáa vit tó ikki gjørt so nógv við uttan at minka um neiligu avleiðingarnar av teimum.

Harafturímóti er ein røð av øðrum viðurskiftum, vit kunnu ávirka, og sum kunnu betra um møguleikarnar at reka vinnu her á landi í kapping við fyritøkur í øðrum londum.

► *Um okkara fyritøkur skulu kappast við fyritøkur í øðrum londum, sum hava bæði styttri leið til kundar og veitarar umframt størri heimamarknað, so er tað serstakliga umráðandi, at okkara vinnupolitisku karmar eru kappingarførir við karmarnar, sum fyritøkurnar í øðrum londum hava.*

Í hesum partinum verða lýst 10 yvirskipað prinsipp, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir politisku skipanini til at nýta sum stavnhald, tá ið avgerðir skulu takast, ið hava týdning fyri føroyskt vinnulív.

Tey 10 vinnupolitisku prinsippini eru soljóðandi:

1. Varandi gagnnýtslu av tilfeingi.
2. Støðugar karmar.
3. Vælvirkandi marknaðir.
4. Effektiva og kappingarføra skattaskipan.
5. Effektiva útlutan av rættindum.
6. Góðar og viðkomandi útbúgvingar- og granskingarskipanir.
7. Smidligan arbeiðsmarknað.
8. Gott undirstøðukervi.
9. Væl virkandi almennan geira.
10. Dagførda vitan um samfelagsgongdina.

Kappingarføri, treytað av varandi gagnnýtslu av tilfeingi, er reyði tráðurin í vinnupolitisku sjónarmiðunum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum verða lýst nærri niðanfyri.



# 01 VARANDI GAGNNÝTSLU AV TILFEINGI



*Varandi gagnnýtsla av tilfeingi merkir, at tilfeingið verður gagnnýtt soleiðis, at bæði vit og komandi ættarlið eisini frameftir hava møguleika at fáa gagn av tí tilfeingi, vit í dag nýta í okkara framleiðslu av vørum og tænastum.*

*Hetta er ein tvørgangandi fortreyt fyri øllum vinnuligum virksemi, og hesum eiga land og kommunur at hava í huga, tá ið karmar fyri vinnuligum virksemi verða lagdir til rættis.* ◄

Við tilfeingi verður í hesum sambandi serliga sipað til náttúrutilfeingi, men eisini búskaparligt tilfeingi og menniskjaligt tilfeingi[1] eru fevnd av hesum.

Varandi gagnnýtsla av *náttúrutilfeingi* merkir millum annað, at fiskastovnar verða røktir við umsitingarætlanum, ið geva bestu úrtøku í longdini. Sama er galdandi fyri framleiðslu á landi og í firðinum, sum skal leggjast til rættis við umhvørvisefirliti, soleiðis at náttúran verður røkt og varðveitt fjølbroytt og ikki verður ávirkað meira, enn hon tolir, av vinnuligum virksemi.

Varandi gagnnýtsla av *kapitaltilfeingi* merkir, at kapitalurin sleppur at leita sær hagar, sum hann fær størsta avkastið, og at tað ber til at viðlíkahalda og gera nýíløgur í kapitalapparatið.

1 Menniskjaligt tilfeingi eru starvsfólkini. Menniskjaligt tilfeingi er ein beinleiðis umseting av enska heitinum Human Resources (HR).

Varandi gagnnýtsla av *menniskjaligum tilfeingi* merkir millum annað, at øll fólk fáa møguleika at bjóða sínar førleikar fram á arbeiðsmarknaðinum. Eingir samfelagsbólkar eiga at føla seg útihýstar, og fólk við skerdum førleikum eiga heldur ikki at vera útihýst frá arbeiðsmarknaðinum. Fólk við avmarkaðum førleikum á ávísum økjum eiga at fáa møguleikar at bjóða seg fram á øðrum økjum.

Øll eiga at taka lut og vera partur av menningini og vøkstrinum í samfelagnum, og arbeiðsumhvørvislóggáva skal virka fyri tryggum og heilsugóðum arbeiðsumhvørvi, sum altíð fylgir tøkniligu menningini og sosialu gongdini í samfelagnum.



# 02

## STØÐUGAR KARMAR

*Tað hevur stóran týdning, at vinnan kennir karmarnar, hon fær at virka innanfyri frá politisku skipanini, nøkur ár fram í tíðina, soleiðis at vinnan kann leggja sínar ætlanir innan fyri hesar karmar.*

*Politisk óvissa eigur ikki at vera týðandi partur av váðamyndini hjá føroysku vinnuni, tí gerandisdagurin í føroyskari vinnu er longu merktur av nógvum óvissum frammanundan.* ◄

Í fiski- og alivinnunum, sum serliga virka á útflutningssíðuni í føroyska búskapinum, fylla náttúruviðurskifti, fiskasjúkur, marknaðaratgongd, prísir á rá- og lidnari vøru, tilgongd av starvsfólki umframt onnur viðurskifti uttanífrá nógv í dagligu váðametingunum. ES-boykottið av føroyskum útflutningsvørum í 2013, avleiðingarnar av koronutiltøkunum og kríggið í Ukraina eru dømir um, hvussu brádliga marknaðirnir og umhvørvið hjá føroyskum útflutningsvinnum kunnu broytast.

Broytiliga umhvørvið hjá føroysku vinnuni ger tað avbjóðandi at leggja ætlanir frameftir. Stórar og ófyrireikaðar broytingar í lógum, kunngerðum, mannagongdum og tænastustøði gera tað tí enn meiri tvørligt og avbjóðandi hjá vinnuni at leggja ætlanir frameftir. Reglurnar kring virksemið mugu vera greitt orðaðar, og tað má vera kent frammanundan, hvussu reglurnar skulu skiljast.

*Tað hevði styrkt um støðufestið hjá vinnuni, um politisku flokkarnir høvdu megnað at gjørt breiðar almennar langtíðarætlanir og -semjur um vinnuligu karmarnar komandi árini. Hetta hevði skapt meira støðugar karmar um vinnuliga virksemið til gagns fyri føroyska kappingarførið og vælferðina í Føroyum.*

At karmarnir skulu vera støðugir merkir tó ikki, at teir skulu vera óbroytiligir. Um tað eru skilagóðar orsøkir til lógarbroytingar, ið ávirka vinnufyritøkur, skulu hesar sjálvandi fremjast. Tá er umráðandi, at broytingarnar verða væl fyrireikaðar, og at viðkomandi partar verða tiknir við upp á ráð og fáa høvi at gera viðmerkingar, áðrenn reglurnar verða settar í gildi. Harnæst er umráðandi, at vinnan fær hóskandi tíð til at fyrireika seg til møguligar broytingar.



# 03

## VÆLVIRKANDI MARKNAÐIR

*At marknaðirnir eru vælvirkandi merkir, at náttúrutilfeingi, starvsfólk og kapitalur verða nýtt, har tey skapa størst virði.*

Hetta kann gerast við at taka burtur stuðulsskipanir og aðrar óhepnar forðingar, fyri at framleiðslufaktorarnir kunnu flyta seg millum bransjur og fyritøkur.

*Málið hjá myndugleikunum má vera, at vinnurnar fáa eins fortreytir og karmar at kappast innanfyri, og at almennu reguleringarnar eru hóskandi til at røkka endamálinum við reguleringini.*

Hvørki ov harðar ella ov linar. Síðan má kappingin og marknaðarkreftirnar sum útgangsstøði gera av, hvat verður framleitt, og hvør framleiðir vøruna ella tænastuna.

*Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur síðan tíðliga í 1990-árunum miðvíst arbeitt fyri, at føroysk vinna skal vera stuðulsfrí og kappingarfør, bæði innanlands og mótvegis útheiminum.*

Almennur stuðul til vinnur og vinnufyritøkur eigur bert at koma fyri, tá ið undantaksstøður gera seg galdandi, t.d. koronufarsóttin, og eigur tá at vera tíðaravmarkaður. Harumframt eiga almennar vinnuframaskipanir at vera generellar og studningsveikar.

Fyri at føroyski heimamarknaðurin skal vera vælvirkandi, hevur tað harumframt stóran týdning, at tað er greitt, hvørjar uppgávur mongu almennu partafeløgini og grunnarnir skulu røkja og undir hvørjum treytum. Hetta eigur at verða ásett í einum almennum eigarapolitikki.

Almenni eigarapolitikkurin eigur at taka støði í leiðreglunum frá OECD um góða leiðslu í almennum feløgum. Eigaraskapur skal vera í áhuga hjá tí almenna, og metast skal neyvt og varisliga um endamálið við almennum ognarskapi: Maksimerar almenni ognarskapurin virði fyri samfelagið? Er grundgevingin fyri almenna ognarskapinum greitt allýst? Og er ognarskapur og politikkur endurskoðaður?

Í OECD-londum er tað vanliga ein ella fleiri av hesum grundgevingum, sum skulu vera galdandi fyri feløg við almennum ognarskapi:

1. Tænastur har tað almenna er effektivari.
2. Marknaðarkreftirnar megna ikki at lyfta uppgávuna ella strekkja ikki til (ofta monopol).
3. Ynski um at varðveita ávísar sektorar á almennum hondum av strategiskum orsøkum.

Eigarapolitikkurin skal sostatt kunna svara, hvat virksemi framvegis eigur at verða rikið undir almennum ognarskapi, og hvat virksemi kann verða steðgað ella einskilt. Um niðurstøðan er, at virksemið framhaldandi skal vera undir almennum ognarskapi, so eigur eigarapolitikkurin at kunna vísa á, hvussu kjarnuuppgávurnar, sum felagið skal røkja, verða skilmarkaðar, soleiðis at felagið ikki fer í holt við virksemi á økjum, sum tað privata er betur skikkað til at taka sær av.

Hetta er grundarlagið, sum ein almennur eigarapolitikkur eigur at hvíla á.



*Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur fleiri ferðir gjørt vart við, at almennar fyritøkur, ið kunnu vera í kapping á privata marknaðinum, eiga at verða einskildar, og at avkastkrav eigur at vera til partafeløg og grunnar, har tað almenna hevur ein týðandi leiklut.* ◄

Føroyar eru ein lítil opin marknaðarbúskapur í altjóða samfelagnum, og føroyska vælferðin er fyri stóran part grundað á víðtøkna og smidliga atgongd til útlendskar marknaðir. Størsti parturin av nýtsluvørunum í føroyska gerandisdegnum verður innfluttur, og stórur partur av vinnuligu framleiðsluni verður útfluttur og seldur á útlendskum marknaðum.

*Handils- og samstarvsavtalur við onnur lond hava tí stóran týdning fyri føroyska vinnu og samfelagið annars, men í løtuni hava Føroyar bert seks fríhandilssáttmálar.* ◄

Hetta er munandi færri, enn okkara kappingarneytar hava. ES-londini hava 40 fríhandilssáttmálar við 77 lond uttan fyri ES umframt innara marknaðin í ES. EFTA-londini hava 30 fríhandilsavtalur, sum fevna um 41 lond uttan fyri ES og EFTA, umframt einstøku avtalurnar, sum EFTA-londini hava hvør í sínum lagi.

Tað er sostatt rúm fyri nógv fleiri avtalum við onnur lond til frama fyri virðisøkingina í føroyska samfelagnum. Hetta er ikki bert galdandi fyri vørur og tænastur, men eisini viðvíkjandi atgongd til at fiska uttan fyri føroyskan sjógv umframt smidligan flutning av arbeiðsmegi og kapitali tvørtur um landamørk.

*Politiska skipanin eigur tí at raðfesta sáttmálar við onnur lond ovarlaga, soleiðis at atgongdin til altjóða marknaðirnir verða víðari, smidligar og meiri vælvirkandi fyri føroyska vinnu.* ◄



# 04 EFFEKTIVA OG KAPPINGARFØRA SKATTASKIPAN



*At skattaskipanin er kappingarfør merkir, at tað ikki eru skatta- og avgjaldsskipanirnar, ið eru avgerandi fyri, um føroyskir løntakarar fara av landinum at arbeiða, ella hvat teir annars velja at fáast við á heimliga arbeiðsmarknaðinum.*

*Harumframt er týðandi, at skatta- og avgjaldsskipanirnar eru settar saman soleiðis, at tær ikki eru kappingaravlagandi og hava ring árin á virkis- og framleiðsluhugin, og harvið eisini á virðisskapanina í landinum.*

OECD hevur víst á, at tað serliga er høgur partafelagsskattur og høgur lønarskattur, sum hava ringa ávirkan á virðisskapanina, tí ov høgir partafelags- og lønarskattir minka um íløgu- og arbeiðshugin.

Hesum sjónarmiðum tekur Føroya Arbeiðsgevarafelag undir við. Tó skal tað viðmerkjast, at føroyski felagsskatturin á 18% verður mettur at vera kappingarførur í altjóða høpi í løtuni.

Føroyar eru eitt nýmótans og vælvirkandi vælferðarsamfelag við sama tænastustøði sum mest framkomnu vælferðarsamfeløgini um okkara leiðir. Eitt nýmótans vælferðarsamfelag er kostnaðarmikið í rakstri, og í Føroyum verða stórir partar av vælferðartænastunum fíggjaðar gjøgnum lønarskattin. Føroyski lønarskatturin er sostatt høgur, tí útboðið av vælferðartænastum økist alla tíðina, og talið á løntakarum er avmarkað.

Tað leggur harumframt eyka trýst á føroyska løntakaran, at føroyska samfelagið er sera opið við fleiri serskipanum fyri arbeiðsmegi, ið arbeiðir aðrastaðni, umframt fólki, sum kemur til landið í styttri tíðarskeið. Øll hesi rinda ikki sama lønarskatt sum vanligi lønmóttakarin í Føroyum, men tey hava fyri stóran part somu atgongd til vælferðartænasturnar, sum føroyski lønmóttakarin rindar.

► *Føroya Arbeiðsgevarafelag metir tí ikki, at føroyska skattaskipanin er tíðarhóskandi og egnað til framhaldandi menning av føroyska vælferðarsamfelagnum.*

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í fleiri umførum mælt til at lækka persónliga inntøkuskattin, serliga lækka marginalskattin á lág- og miðalinntøkur. Munagóðir skattalættar fara at kosta almennu kassunum stórar upphæddir. Tí má hetta fremjast gjøgnum eitt longri áramál í tøttum samstarvi millum land og kommunur, har vanligi inntøkuskatturin stigvíst verður lækkaður, samstundis sum frádráttir og serskipanir verða strikaðar, og fleiri tænastu- og brúkaragjøld koma ístaðin.

Tað ber neyvan til at fremja slíkar umskipanir til fleiri tænastu- og brúkaragjøld, sum ikki fara at venda tunga endan niðureftir. Lægstu inntøkurnar í Føroyum rinda lutfalsliga lítið í inntøkuskatti, og skal tað vera møguligt at geva miðalinntøkunum ein skattalætta, sum verður fíggjaður við breiðari skattagrundarlagi, so verður trupult ikki at raka lægstu inntøkurnar. Tí verður helst eisini neyðugt við afturberingum til lægstu inntøkurnar.

Tað hevur harumframt stóran týdning, at skattaskipanin er soleiðis sett saman, at tað altíð loysir seg at arbeiða. Tað má ongantíð vera skattaskipanin, sum setir lønmóttakarar í eina slíka støðu, at tað fíggjarliga loysir seg betur at lata vera við at arbeiða.



Endamálið við skattum og avgjøldum er í fyrsta lagi at fíggja vælferðarsamfelagið, men skattir og avgjøld verða eisini brúkt til at ávirka eftirspurningin og nýtsluna í samfelagnum. Skatta- og avgjaldsskipanirnar eiga tí at verða lagdar soleiðis til rættis, at tað fíggjarliga loysir seg at velja orkusparandi loysnir við minni útláti fram um meira orkukrevjandi loysnir við størri útláti.



# 05 EFFEKTIVA SKIPAN KRING ALMENN RÆTTINDI



*Tað almenna ræður yvir fleiri rættindum við búskaparligum virði, t.d. fiskirættindum, aliloyvum, festirættindum og rættindum til at gagnnýta vatn til vinnulig endamál. Hesi rættindi verða við loyvisskipanum latin privatum feløgum í sambandi við teirra vinnuvirksemi.*

Tær skipanir, sum landið setur í verk kring útlutan og umsiting av slíkum skipanum, mugu vera effektivar og gjøgnumskygdar skipanir, ið eru lættar at umsita og ikki forða fyri effektiviteti og nýskapan hjá teimum, ið fáa rættindini at umsita.

Endamálið við at útluta hesi rættindi er at fáa mest møguligt samfelagsvirði burtur úr almennu rættindunum í longdini. Tað hevur tí stóran týdning, at rættindini eru umsetilig, soleiðis at tað í longdini altíð verður tann mest effektivi, ið umsitur rættindini. Tað hevur harumframt stóran týdning, at rættindini hava eina hóskandi gildistíð, tí talan er ofta um stórar íløgur, sum krevja langtíðarfígging hjá teimum, ið umsita almennu rættindini.

*Loyvisgjøldini fyri framíhjárættin at umsita almenna tilfeingið eigur at fylgja gongdini í avlopinum í vinnuni, soleiðis at mest verður goldið, tá ið nýtslurættindini kasta nógv av sær, og minni verður goldið, tá ið virksemið ikki kastar so nógv av sær. Eisini er neyðugt at hava kappingarførið hjá vinnuni í huga.* ◄

Loyvisgjøld og tilfeingisskattir mugu tó ikki tálma nýskapanini hjá teimum, ið fáa rættindi at umsita alment tilfeingi.

Tí má kostnaðurin fyri nýtslurætt til alment tilfeingi skiljast frá vinninginum av nýskapan og dugnasemi. Um úrslitið av dugnasemi og nýskapan verður skattað hægri enn annar vinningur, so avmarkar tað kappingarfyrimunir við nýskapan og dugnasemi.

Vísast kann í hesum sambandi til frágreiðing frá Búskaparráðnum frá 2014,[2] har Búskaparráðið skrivar soleiðis:

*Í føroysku uppsjóvarvinnuni hava summar fyritøkur verið tøkniliga og vinnuliga innovativar út yvir tað vanliga. Hesar hava fingið royndir og servitan gjøgnum longri áramál, sum fáar aðrar fyritøkur kunnu gera teimum eftir. Tann eyka búskaparrentan, sum kann staðførast til hendan innovativa serkunnleikan hjá fyritøkuni verður sum áður nevnt kallað intramarginal renta (ella quasi renta).*

*Hendan intramarginala rentan eigur ikki at verða roknað við í tilfeingisrentuna, og eigur tí sjálvsagt ikki at koma undir tilfeingisgjaldskyldu. Vit kunnu siga, at intramarginal renta 'hoyrir' til kapitalin og arbeiðsmegina, og skal ikki „tilfeingis-skattast", meðan tilfeingisrentan 'hoyrir' til sjálvt tilfeingi sum 'almenn ogn' og eigur tí sum útgangsstøði at „tilfeingis-skattast".*

Hóast nýggj ættarlið av politikarum í áravís hava kjakast um útluting av fiskirættindum, soleiðis at størst møgulig samfelagsnytta fæst burtur úr okkara tilfeingi, so er tað hugvekjandi, at vit nú, eftir drúgt politiskt stríð um eina effektiva útlutan av fiskirættindum, hvørs endamál er at geva størst møguligt virði fyri samfelagið, eru endað aftur í einum politiskum kjaki, um at býta menningarkvotur kring landið.

2 Upprit frá Búskaparráðnum frá juni 2014: „Búskaparrenta og tilfeingisrenta í føroyska búskapinum."



Hetta er eitt afturljóð og sami fiskivinnupolitikkur, ið varð rikin fyri meira enn 30 árum síðan.

Støðan hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er, at umskipan av inntøkum og virðum í samfelagnum eigur at verða framd gjøgnum skattapolitikk.

*Umskipan skal ikki fremjast gjøgnum vinnupolitikkin, sum eigur at taka støði í atlitum til effektivitet og virðisskapan.* ◄



# 06 GÓÐAR OG VIÐKOMANDI ÚTBÚGVINGAR- OG GRANSKINGARSKIPANIR

*At hava góðar og viðkomandi útbúgvingar- og granskingarskipanir merkir, at útbúgvingar- og granskingarumhvørvið verður lagt soleiðis til rættis, at útbúgvingar og gransking eru viðkomandi, mennandi og virðisskapandi fyri føroyska samfelagsbúskapin og samfelagið annars.*

*Førleikar og menning hava alsamt størri týdning fyri nýskapan og produktivitetsvøkstur í føroysku vinnuni. Tað er tí umráðandi, at vit í Føroyum hava atgongd til viðkomandi dygdargóðar útbúgvingar.*

Vit hava tørv á fólki við praktiskum, yrkisrættaðum førleikum og á fólki við útbúgvingum á akademiskum stigi.

Eisini er týdningarmikið við gransking í viðkomandi evnum á høgum stigi, sum kann menna og loysa avbjóðingar í vinnuni, ikki minst tá ið talan er um serføroyskar avbjóðingar. Tað finnast fleiri góð dømi um væleydnaðar granskingarverkætlanir knýttar at vinnuni, t.d. í alivinnuni, men tað eru eisini fleiri viðurskifti, ið eru afturúrsigld og tørva dagføringar á útbúgvingarøkinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag sær eisini ein tørv á fleiri viðkomandi útbúgvingum fyri føroyska samfelagið. Føroyskir útbúgvingarstovnar eiga tí at menna føroyskar útbúgvingar- og granskingarverkætlanir í nógv tættari samstarvi við vinnuna.

Føroyskir útbúgvingarstovnar mugu eisini hava tætt samstarv við útlendskar útbúgvingarstovnar, soleiðis at føroyskur ungdómur kann varðveita tilknýti til føroyska samfelagið, hóast tey taka útbúgvingina ella partar av útbúgvingini uttanlands. Endamálið er bæði at geva føroyskum ungdómi fleiri møguleikar og víðari sjónarring uttan fyri landoddarnar, soleiðis at tey kunnu vera partur av altjóða samfelagnum uttan at vera noydd at flyta av landinum í ov langa tíð.



# 07 SMIDLIGAN ARBEIÐSMARKNAÐ

*Ein smidligur arbeiðsmarknaður merkir, at tað er lætt hjá arbeiðstakarum at skifta millum størv, samstundis sum arbeiðsgevarar hava góða og breiða atgongd til arbeiðsmegi.*

Hetta fer fram á einum arbeiðsmarknaði, sum annars er væl skipaður við avtalum og reglum.

*Ein liðiligur arbeiðsmarknaður hevur avgerandi týdning fyri vinnulív og samfelagið annars.* ◄

Føroyski arbeiðsmarknaðurin er skipaður eftir tí sokallaða danska modellinum við avtalum millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Henda skipanin leggur stóra ábyrgd á partarnar á arbeiðsmarknaðinum at samráðast um lønar- og setanarviðurskifti innan fyri karmarnar, lóggávan setir fyri trætuloysnum og øðrum ósemjum millum partarnar.

Samanborið við fleiri OECD-lond, sum OECD sigur hava ov stirvnar arbeiðsmarknaðarskipanir, so hava Føroyar og flestu Norðurlond rættiliga liðiligar og væl skipaðar arbeiðsmarknaðir. Grundarlagið undir vælskipaðu og liðiligu arbeiðsmarknaðunum eru avtaluskipanirnar, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum og politiska skipanin mugu kenna og virða.

Smidleikin á føroyska arbeiðsmarknaðinum er ikki bert galdandi innanlands, hann røkkur eisini tvørtur um landamørk. Ein lutfalsliga stórur partur av føroysku arbeiðsmegini arbeiðir uttanlands. Hetta er sunt fyri føroyska samfelagið, men

hetta frælsið er tó treytað av, at tey sum arbeiða uttanlands ikki fáa serligar treytir og ágóðar fram um tey, sum arbeiða í Føroyum.

At útvega arbeiðsmegi hevur verið ein daglig avbjóðing hjá føroyskum arbeiðsgevarum seinastu árini. Tí eiga stuðuls- og serskipanirnar til føroyingar, ið arbeiða uttanlands at verða endurskoðaðar, samstundis sum føroyskir arbeiðsgevarar altíð eiga at hava góða atgongd til skikkaða arbeiðsmegi, um hon ikki er tøk í landinum.

Tað eru møguliga eisini avleiðingarnar av mongu forsøgnunum og spádómunum, seinastu árini, um at vit fara at verða færri og færri á arbeiðsmarknaðinum, sum nú síggjast. Tað er ikki bara í Føroyum, at tað er ein avbjóðing at útvega arbeiðsmegi. Flestu londini uttan um okkum hava eisini tørv á arbeiðsmegi. Nógva staðni merkja tey harumframt bygnaðarligar avbjóðingar á arbeiðsmarknaðinum við stórum ósamsvari millum útboð og eftirspurning eftir arbeiðsmegi.

Hetta eru viðurskifti, sum hava stóran týdning fyri, hvussu arbeiðsmarknaðurin kemur at hátta sær í nærmastu framtíð.

Hóast bústaðarviðurskifti vanliga ikki verða mett sum arbeiðsmarknaðarmál, so hava bústaðarviðurskifti stóran týdning fyri ein smidligan arbeiðsmarknað. Ein fjølbroyttur bústaðarmarknaður við breiðum úrvali av eigara- og leigubústøðum, í ymsum støddum, hevur stóran týdning fyri flytiføri hjá arbeiðsmegini. Tað hevur stóran týdning fyri arbeiðsmarknaðin, at fólk hava møguleika at flyta eftir tørvi á lívsleiðini, líka frá tí, at tey byrja at útbúgva seg til arbeiðsmarknaðin, til eftir, at tey eru farin av aftur arbeiðsmarknaðinum at njóta pensjónist tilveruna. Her er føroyski bústaðarmarknaðurin alt ov stirvin við ov fáum og einstáttaðum útboði av bústøðum.



# 08

## EFFEKTIVT UNDIRSTØÐUKERVI

*Fyri eitt lítið fjarskotið oyggjaland sum tað føroyska mitt í Atlantshavinum hevur eitt effektivt undirstøðukervi alstóran týdning bæði innanoyggja og millum Føroyar og útheimin.*

Undirstøðukervi fevnir m.a. um sjóvegis samband, loftvegis samband, landvegis samband og talgilt samband og samskifti.

Føroyar hava sera væl útbygt undirstøðukervi á øllum økjum, bæði innanlands og við útheimin.

*Hetta eigur at verða gagnnýtt nógv meira, har Føroyar í størri mun verða marknaðarførdar sum ein maritimur sjóvinnudepil mitt í Atlantshavinum,* ◄

við øllum hentleikum og betri sjóvegis- og serliga loftvegis sambandi við meginlandið í Evropa, enn okkara næstu grannar kunnu bjóða.

Tað hevur stóran vinnuligan týdning, at almennu Føroyar skapa karmar til at viðlíkahalda og menna góða undirstøðukervið, Føroyar hava í dag. Tó skal altíð metast, hvat samfelagsgagn fæst burtur úr einari ávísari íløgu, áðrenn hon verður framd.






# 09 VÆLVIRKANDI ALMENNAN GEIRA

*Tað mugu vera greiðar linjur millum alment og privat virksemi. Vinnuligt virksemi verður lagt til privatu vinnuna at taka sær av, og politiska skipanin eigur at taka sær av og raðfesta stóru vælferðarøkini, sum t.d. heilsu-, almanna-, skúla- og eldraøkið.*

Hetta merkir tó ikki, at tað almenna sjálvt skal røkja allar tænasturnar, sum politiska skipanin bjóðar út í samfelagnum. Politiska skipanin raðfestir og ger av, hvørjar almennar tænastur skulu bjóðast út til borgararnar í samfelagnum. Almennu myndugleikarnir kunnu síðan bjóða uppgávur og tænastur út til privatu vinnuna at taka sær av. Uppgávan hjá almennu myndugleikunum verður síðan at hava eftirlit við, at privatu fyritøkurnar veita almennu tænastuna til borgaran sambært ásettum krøvum, sum almennu myndugleikarnir hava sett út í kortið.

*Tað almenna eigur bert at framleiða tær tænastur, har ongar marknaðarfortreytir eru, og tí eru illa egnaðar at verða bodnar út, t.d. grundleggjandi heilsutænastur, undirvísing, infrakervi o.a.* ◀

Tað hevur tí týdning, at politiska skipanin regluliga endurskoðar, hvørjar almennar tænastur eru egnaðar til at verða bodnar út, eisini hvørji almenn partafeløg, grunnar og stovnar eiga at verða privatiseraðir.

Tænastustøðið í almenna geiranum hevur stóran týdning fyri føroyska vinnu. Føroya Arbeiðsgevarafelag gjørdi í 2017

kanning[3] av føroyska kappingarførinum í mun til onnur lond. Úrslitið av kanningini vísti, at Føroyar lógu í ovasta triðinginum av øllum heimsins londum, men í miðal, tá ið samanborið varð við hini Norðurlondini.

Ein av niðurstøðunum í kanningini var, at føroysk vinna metti óstøðug politisk viðurskifti og tunga almenna umsiting vera millum størstu forðingarnar fyri vinnuligari framgongd.

3 Sí Føroya Arbeiðsgevarafelag: Kappingarføri Føroya – Klára vit at kappast? – 2017.



10

## DAGFØRDA VITAN UM SAMFELAGSGONGDINA

*Dagførd vitan um samfelagsgongdina er í veruleikanum ikki eitt vinnupolitiskt prinsipp, men Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur kortini valt at taka hetta við undir vinnupolitisku prinsippini, tí støðan hesum viðvíkjandi er als ikki nøktandi í dagsins samfelag, og Føroyar hava fyrr brent seg av vantandi vitan um veruligu støðuna og gongdina í samfelagnum.*

Í góð 20 ár, fram til 1985, vórðu føroyska uttanlandsskuldin og føroyski gjaldsjavnin gjørd upp við regluligum teljingum og eftir óbroyttum prinsippum, men í 1985 gavst Hagstovan við hesi uppgerð. Hagstovan fór tá at gera metingar og framskriva seinastu uppgerðina frá 1984. Hesar framskrivingar vórðu gjørdar í nøkur ár, fram til 1988, tá ið uttanlandsskuldin aftur varð gjørd upp eftir somu prinsippum, sum uppgerðin varð gjørd eftir fyri 1985.

Úrslitið av uppgerðini var, at framskrivaða netto uttanlandsskuldin í 1988 varð uppskrivað 70%, og hallið á gjaldsjavnanum vísti seg at vera 140% størri, enn framskrivingarnar vístu.[4] Tað kom rættiliga óvart á tey flestu, at framskrivingarnar eftir bert trimum árum vóru farnar so langt við síðuna av.

4 Víst verður til Hagtíðindi nr. 2 frá juli 1989 frá Hagstovu Føroya, har hesi viðurskifti verða nágreiniligari lýst.

► *Støðan í dag minnir tíverri um støðuna í 1980-árunum. Vit hava ongan tjóðarroknskap í føstum prísum. Føroyska bruttotjóðarúrtøkan og onnur tjóðarroknskapartøl eru vanliga grundað á metingar oman á metingar.*

Framrokningarnar av føroysku bruttotjóðarúrtøkuni eru tí rættiliga ivasamar og ikki nóg álítandi at geva eina rættvísandi mynd av føroyska búskapinum. Tað er tí ikki óvanligt, at framrokningarnar verða broyttar innan fyri stutta tíð við munandi rættingum.

BTÚ-metingarnar hjá Búskaparráðnum eru t.d. broyttar stívliga 80% eftir 6 mánaðum,[5] og Hagstova Føroya hevur nýliga lækkað BTÚ-uppgerðina fyri 2018[6] 414 mió. kr. Hetta merkir, at áður gjørdar metingar, við 2018 sum grundarlag, eisini eru langt við síðuna av. Kortini verður framroknaða føroyska bruttotjóðarúrtøkan dúgliga brúkt til metingar og samanberingar av gongdini í føroyska búskapinum. Metingarnar kunnu tí mangan tykjast rættiliga veruleikafjarar fyri vinnuna.

Tað mangla eisini dagførd hagtøl á nógvum øðrum økjum. Nýggjastu útflutningstølini vísa bert útflutningin av vørum. Metingin av tænastujavnanum er fleiri ára gomul. Tí vita vit ikki, hvussu nógvar tænastur føroyingar selja og keypa til og úr øðrum londum. KT-vinnan, ferðavinnan og handilsskipini hava í nógv ár saknað hesar hagtalsuppgerðir fyri síni øki.

Eisini mangla hagtøl fyri útgoldnar lønartímar, og tí ber ikki til at samanbera gongdina í lønarlagnum og møguliga lønarglíðing við onnur lond. Arbeitt hevur verið við at fáa betri lønarhagtøl, men enn er ikki komið á mál.

5 Sí heystfrágreiðingina hjá Búskaparráðnum frá 2019.
6 www.hagstova.fo 24. februar 2021: BTÚ og høvuðstøl.



Tá ið alt hetta er sagt, so skal eisini viðmerkjast, at á nøkrum økjum hava vit helst millum bestu og mest dagførdu hagtølini í heiminum. Hetta er t.d. galdandi fyri mánaðarligar a-inntøkur, skattgjaldingar, MVG-uppgerðir umframt út- og innflutning av vørum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ta fatan, at vit bæði hava stovnar og skikkaða arbeiðsmegi, ið ikki manglar viljan at framleiða tær hagtalsuppgerðir, sum samfelagið bæði hevur tørv á og spyr eftir. Vit hava t.d. Hagstovuna, Landsbankan, Búskaparráðið og Váðaráðið, sum kundu framleitt hesar uppgerðir, men politikarar hava víst seg at verið meira upptiknir av, hvussu hesir stovnar skulu skipast, og hvat heitið á teimum skal vera, enn hvørjar hagtalsuppgerðir teir skulu framleiða.

KAPPINGARFØRAR

# FØROYAR



FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

VINNUSJÓNARMIÐ